## Dómarar fyri rættin

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur stýrisskipanarnevndin hjá norska Stórtinginum samtykt at biðja Stórtingið taka støðu til, um ríkisrættarsak skal reisast ímóti trimum dómarum í norska hægstarætti. Málið snýr seg um ein mann, sum sat meiri enn 18 ár í fongsli fyri tvey morð. Í 2004 bleiv hann fríkendur fyri annað morðið, men hægstirættur sýtti fyri at viðgera hitt málið fyrr enn í 2006, og tá var maðurin deyður. Tað var eitt mistak, sigur nevndin.



*Karen Bruzelius er ein av teimum trimum dómarunum, sum kunnu enda í einum ríkisrætti*
*(Mynd: Aftenposten)*

## Eftirlit við flogførum

Grønlendski landsstýrismaðurin í uttanríkispolitiskum viðurskiftum, Aleqa Hammond, gav í gjár loftferðslumyndugleikunum boð um at skipa fyri eftirliti á øllum landsins flogvallum. Hon hevur samstundis álagt myndugleikunum at kunna øll sivil flogfør, sum lenda í Grønlandi, um eftirlitið. Umframt eftirlitið hjá loftferðslumyndugleikunum skal tollvaldið hava eftirlit við flogførunum, endamálinum við ferðini og ferðafólkunum, sigur KNR.

# ber boð um samfelagsbatar



*Samskiftisráðgevin hjá Samtak harmast um, at einki sæst í samgonguskjalinum um, at oljuavgjaldið, sum er ein tungur kleppur fyri føroysku húsarhaldini, fer at lække, so lættari verður hjá familjunum at fáa gerandisdagin at hanga saman*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

vónir um, at nýggi vinnumálaráðharrin fer at taka málið um frítíðarlønina upp.

- Vit fegnast sjálvsagt um, at samgongan hevur sett sær fyri at broyta forsorgarlógina, sum er ein gomul lóg, smíðað til danska samfelagið.

Hon heldur, at sum heild kundu flestu flokkar tikið undir við fleiri av ynskjunum, sum Samtak sendi tinglimunum beint eftir valið.

### Útbúgvingarstuðul

- Hóast tað ikki sæst í samgonguskjalinum, vónar samskiftisráðgevin, at nýggja landsstýri fer at broyta lógina um útbúgvingarstuðul, soleiðis at eisini tey, ið eru undir 18 ár, kunnu fáa útbúgvingarstuðul.

Sonja vísir á, at tað eru ikki øll foreldur, sum hava ráð til at gjalda fyri skúlagongdina hjá børnum sínum, og tí noyðast nøkur børn út á arbeiðsmarknaðin, tí tey snøgt sagt ikki hava ráð til at ganga í skúla.

- Eg haldi ikki, at tað hevði kostað so ógvuliga nógv, um eisini ungdómar undir 18 ár fingu lut í útbúgvingarstuðlinum, men hetta hevði verið til gangs fyri mong - og í seinna enda eisini fyri samfelagið, leggur hon aftrat.

Hon heldur, at útbúgvingarstuðulin eisini átti at verið styrktur, tá ið ræður um stakar uppihaldarar, eins og Samtak mælti til.

- Eg fegnist um, at samgongan hevur ætlanir um ein útbúgvingargrunn, og eg fegnist eisini um, at samgonguskjalið nertir við hin rúmliga arbeiðsmarknaðin.

### Tilfeingið

Sonja Jógvansdóttir sigur seg eisini fegnast um, at samgongan hevur sett sær fyri at steðgað privatari spekulatión í fiskivinnuni, soleiðis at tað, sum vit skilja við ogn Føroya fólks.

- Tað kann ikki vera rætt, at hetta ríkidømi, sum vit øll meta okkum at eiga lut í, fer til at ríka upp nakrar vinnulívsmenn, samstundis sum vinnan liggur tung í sjónum, sigur hon.

### FAKTA

Feløgini í Samtak eru Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag.

Ætlanin er at savna fleiri fakfeløg í Samtak.

Samtak skal ikki avloysa fakfeløgini, men skal arbeiða á yvirskipaðum stigi.